# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fíggjarlógaruppskotið – ymisk signal

Fíggjarlógaruppskotið fyri 2008 er lagt fyri løgtingið. Talan er um eina sermerkta fíggjarlóg, ið bert kemur at vera galdandi í gott og væl eitt hálvt ár. Tað er tí avmarkað, hvat ið kann avlesast um landsstýrisins politikk út frá uppskotinum. Hinvegin eru nakrar útmeldingar í viðmerkingunum, í tølum og í tí tíðindaskrivi, sum fylgdi við uppskotinum. Hesar útmeldingar eru merktar av ymiskum signalum, ið umboða støðuna hjá viðkomandi landsstýrismanni eins og hjá allari samgonguni. Staðfestast kann, at uppskotið í høvuðsheitunum ikki brýtur so nógv frá tí politikki, sum undanfarna samgonga rak fram til val varð útskrivað. Hesum er einki løgið í, tí nýggja samgongan hevur valla funnið síni egnu bein enn. Hinvegin eru signal, ið eru verd at leggja til merkis. Fyri tað fyrsta verður fráboðað, at fíggjarlógaruppskotið fyri 2008 raðfestir tey bleytu virðini, úbúgving og sosial átøk. Sagt verður at raðfestingarnar vísa profilin hjá nýggju samgonguni, og at givin lyfti, verða hildin. Uttan at fara í dýpdina við einstøku greinunum kunnu vit staðfesta, at heilt yvirskipað samsvarar henda umsøgn við tølini fyri útbúgving, mentan, gransking og fyri almannamál. Samstundis verður lovað, at hesar raðfestingar vera "upp aftur greiðari í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2009." Hetta er eitt sera sterkt og bindandi lyfti. Vit kunnu bert vóna, at fíggjarmálaráðharrin, her ikki hevur tikið munnin ov fullan.

Hinar útmeldingarnar eru av øðrum slagi og snúgva seg um fíggjarstýringina og altjóða búskaparútlitini. Fráboðað verður stórt fokus á fíggjarstýringini. Landsstýrismaðurin leggur stóran dent á, at neyv fíggjarstýring skal fáast í lag alt fyri eitt, og at samgongan góðtekur ikki meirnýtslu í mun til givnar játtanir. Hetta nemur við eyma spurningin um samsvar millum tørv og játtan. Kommunurnar fáa gula kortið, og málið er at fáa langtíðarjavnvág í einum sjálvberandi og óheftum føroyskum búskapi. Her er eins og undir fullveldissamgonguni talan um ein fíggjar- og búskaparpolitikk, sum skal skapa fortreytirnar fyri føroyskum fullveldi. Triðja útmeldingini snýr seg um føroyska búskapin og altjóða útlitini. Minni virksemi verður í føroyska búskapinum í ár, og stóri privati eftirspurningurin í Føroyum fer at minka. Hartil verður víst á vandarnar í altjóða búskapinum. Sagt verður, at enn er ógreitt, hvussu altjóða búskapurin fer at hátta seg. Tað eru serliga ávís viðurskifti, sum hótta búskaparliga vøksturin: vaksandi oljuprísir, vaksandi rávøruprísir, spenta støðan á fíggjarmarknaðunum, rentugongdin og gongdin í dollarakursinum. Tað er rætt at vísa á illveðurssignalini, men tað hastar samstundis við eini ætlan B. Hvat gera vit, um illveðrið rakar Føroyar? Høvið verður at venda aftur til fíggjarlógaruppskotið.

**Sosialurin**

## Heðin Mortensen er dumpaður

NAPOLION MAGNUSSEN



Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, er so dyggiliga dumpaður sum javnaðarmaður. Við ongum argumentum sum líkjast nøkrum hevur hann roynt at tala at eini útjavning millum kommunurnar. Tað sær næstan út sum um hann heldur talar fyri at skapa órættvísi í landinum. Bert slíkt tvætl, at so seta kommunurnar seg hendur í favn at bíða eftir kekkinum, at útreiðslurnar skula eisini útjavnast og at kommunurnar sjálvar skula gera útjavningargrunn en nøkur av hansara vánaligu argumentum. Hetta seinasta tí at hann veit, at hann kanska við hjálp frá onkrari aðrari ríkari kommunu, helst fær forpurrað nakra líkinda útjavning. Her muga fleiri kanningar og útgreiningar gerast, sigur Heðin. Jújú, royn at draga út til ov seint er og ikki vendist aftur, hin gamli.

Og so úttalar Heðin seg sum umboð fyri allar tær stóru kommunurnar og meginpartin av borgarunum í landinum, sigur hann enntá. Meira slutur og vrøvl skal ein leita leingi eftir, tí so asosialt hugsa fólk ikki úti um landið og heldur ikki ein gang helvtin av bygdafólkunum í Havn. Tey vilja sínum heimbygdum betri enn so. Men ikki Heðin, uppvaksin á Tvøroyri, men tað sær alt út til at verða gloymt.

Tað, sum sigur nógv um mannin er, at samstundis sigur hann í samband við málið um eksterna fjølmiðlaráðgeving, at hansara høvuðsuppgáva er at verja Havnina. Og júst tað gevur honum enn ein dumpikarakter. Boðskapurin tykist at verða: alt skal verða her, gloymið alt og øll rundan um meg, bara eg eri ríkur og havi nokk! Hesin hoyrir als ikki heima í Javnaðarflokkinum, sigi eg tykkum.

Formaður Javnaðarflokssins á tinginum segði, eftir at Búskaparráðið hevði lagt sítt uppskot fram, at flokkurin tók undir við hesum. Enn ein dumpikarakter til Heðin Mortensen. Hevði verið gott um hinir flokkarnir komu við teirra støðu til uppskotið.

Hetta, sum her er skrivað, kann tykjast harligt og ógvusligt, men í mun til veruleikan er hetta penuts. Veruleikin er verri enn so, hann er eitt samfelag við minni enn 50.000 túsund fólkum, har helvtin er um at vera mist fyri bakka! Helvtin av ein samfelag, sum gjøgnum ringar tíðir hevur hugsað um hjálpsemi, men sum nú, við stórum vøkstri, skapar órættvísi og minni mentu ikki klára at kappast og ikki kunna bjóða og skapa fasilitetir eins og tey stóru og ríku, sum fáa borið alt upp í hendurnar í dag.

Og tí er tað ivasamt, um uppskotið hjá Búskaparráðnum er nóg víðgongt. Hvat við stóru almennu leiguinntøkunum í Havn í mun til úti um landið? Hvat við øllum tí almenna virkseminum, sum smittar av á Havnina? Hvat við havna- og vørugjøldum frá innflutninginum til alt landið, sum allur fer um kajkantin í Havn? Og at tosa um útreiðslur í mun til inntøkur er láturligt, tí vit síggja hvussu Havnar kommuna oysir um seg uttan fyrilit í allar ættir. Har tykist mestsum størsti trupulleikin at klára at brúka pengarnar. At so fíggjarmálaráðharrin hóttir við at tálma kommununum fíggjarliga er av einu og somu orsøk: oyðslið í Havn!

Nú er upp á tíðina, at Løgtingið, og ikki mist Javnaðarflokkurin eftir at hava boða sína støðu, taka seg um reiggj, tí skeivleikin er so ovurhonds stórur millum kommunurnar eftir hondini, at ivasamt er um hetta kann rættast. Endin verður helst, at vit muga velja at hava eina kommunu í landinum, tí tá Havnar kommuna er farin uppum tey hálvt hundrað prosentini av fólkatalinum vendist ikki aftur. Teir eru, sum er, væl oman fyri tey fjøruti prosentini, so ikki skal nógv til afturat fyrrenn skaðin er fullkomin. Útjavning er annað avgerandi málið fyri framburi í hesum landi, at øll fáa ágóðan av okkara ríkidømi og inntøkum. Hitt málið er kommunusamanlegging, helst tvungin, tí sum nú sær út enda vit í enn einum fýra ára skeiði við andróðri og afturúrsigling av meginpartinum av landinum, í øllum førum um útjavning ikki kemur.

## Viðmerking til Jørn Astrup Hansen, formann í Búskaparráðnum

POUL HANSEN

Í Degi og viku 15/4-2008 segði tú m.a., at ein av orsøkunum til at fiskiflotin nú hevði trupulleikar var, at fiskiskipini vóru yvirkapitaliserað.

Partvís samdur, men yvirkapitaliseringin kundi bert gjøgnumførast, tí peningastovnarnir fíggjaðu hana.

Smb. lógini um vinnuligan fiskiskap kunnu veiðiloyvir ikki setast í veð.

Hetta hevur sjálvandi lagt eina avmarking á fíggingarmøguleikarnar við sølu/keyp av bátum við veiðiloyvum.

Í tínari tíð sum stjóri í Føroya Banka royndi tú sjálvur at leggja trýst á politiska myndugleikan um at loyva peningastovnunum at taka veð í veiðiloyvunum, á sama hátt, sum tit saman við Havbúnaðarfelagnum at enda fingu loyvi til at veðseta aliloyvini.

Reiðarafelagið gekk ímóti tilráðing tíni við tí grundgeving, at um veiðiloyvini kundu veðsetast, vildi søluprísurin á skipum við veiðiloyvum økjast munandi, sum sjálvandi vildi økt um talið á skipasølunum fyri ein hægri prís, tí fíggingarmøguleikar frá m.a. tínum banka vildu tá verið nógv betri.

Reiðarafelagið vildi tí ikki mæla myndugleikunum til at broyta lógina um vinnuligan fiskiskap til at loyva veðseting av veiðuloyvum.

Um tú hevði fingið tín vilja tá, vildi føroyski skipaflotin verið nógv meira skuldarbundin enn hann er í dag.

Vit báðir hava fyri nøkrum árum síðani verið í hornatøkum um sama evni, og tú veitst væl, at tað eg sigi er rætt.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.